

# MÚRURIN KOM VÆL FRÁ BYRJAN

**Onkrar barnasjúkur vóru, og sjálvur festivalurin byrjaði ein góðan tíma ov seint, men tá so glið var komið á, koyrdi tað bara við Múrin**

VIÐ MÚRIN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Klokkan fýra í gjár skuldi fyrsti bólkurin, fara á pall við Múrin í Kirkjubø í gjár. Hetta hendi ikki fyrr enn klokkan var farin av fimm, tá 3st fór á lítla pall. Á midnátt skuldi stóra navnið Trentemøller fara á pall. Hóast skráin var seinkað ein góðan tíma frá byrjan, var klokkan ikki nógvar minuttir yvir midnátt, tá danin við house- og elektronisku rútmunum, sum tað seinasta navnið, byrjaði.

Harvið koyrdi tað bara, tá fyrireikararnir høvdu fingið glið á. Orsøkin til seinkingina var, at sjálvur pallurin var komin so seint til Føroya, og at hann tískil ikki var klárur til tíðina.

### Stórt festivaløki

Til teirra, sum ikki hava vitjað við Múrin, er tað at siga, at talan er um eitt ógvuliga stórt festivaløki, har tjaldingarplássi liggur beint upp at. Harvið hava gestirnir eina rúgvu av fermetrum at breiða seg á, og tað er deiligt. Um tú ynskir at standa væl og kortini hava gott sýni til pallin, ber hetta betur til enn á nøkrum øðrum festivali í Føroyum.

Stóra plássið ger eisini, at tað er ógvuliga ilt at meta um, hvussu nógvir gestir vitjaðu festivalin í gjár. Eingin ivi er tó um, at talan var um fleiri túsund gestir. Hetta sást til konsertina hjá MC-Hár og tá Tiesto spældi.

### Børnini sleppa upp í part

Dagurin í gjár var einamest ætlaður teimum, sum dámdu tónleik. Børn og barnafamiljur sóust eisini fleiri staðni, men tað verður ikki fyrr enn í dag, at børnini sleppa upp í part, tá Gyklaralandið opnar.

### Enn verður arbeitt

Hóast góða byrjan, er ikki alt, sum var komið upp á pláss í gjár. Enn varð arbeitt á fleiri frontum. Millum annað stóð sokallaða pressutjaldið tómt. Har var einki. Einki borð, eingin streymur og einki internet.

Tá fyrireikararnir standa fyri einum slíkum tiltaki fyri fyrstu ferð, eru sjálvsagt onkrar barnasjúkur. Hetta máttu fjølmiðlarnir líða undir í gjár, og av tí sama var tað millum lítið og einki, ið kom á Portalin.











## EYKAGJALD VIÐ MÚRIN

**Tað verður álagt øllum, sum fara til Múrin at rinda annaðhvørt 20 ella 50 krónur hvønn vegin fyri bæði børn og vaksin við bussi. Hetta kann skjótt gerast eitt dýrt fornøjelsi**

VIÐ MÚRIN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað er ikki loyvt at koyra til Kirkjabø í hesum døgum, festivalurin við Múrin er í Kirkjubø. Henda trupulleika siga fyriskipararnir seg hava loyst við at hava bussar, sum koyra við pendulfart millum festivaløki, Gomlu Rætt og Badmintonhøllina í Havn.

Fyri at gera dælt av hesum tilboði, skalt tú rinda 50 krónur fyri at koyra úr Havn og 20 krónur fyri at koyra frá Gomlu Rætt. Eitt gjald, sum fyrireikararnir ikki hava lýst við, men tú sum vitjandi skuldi gjalda fyri at sleppa inn.

Hetta hevur fingið sinnið í kók hjá fleiri, tí á henda hátt kann talan gerast um eitt ógvuliga dýrt fornøjelsi.

Hetta merkir, at um eitt foreldrapar fer við trimum børnum og ætlar at vitja festivalin allar dagarnar, so skulu hesi punga út við minst 600 krónum, bara fyri at sleppa inn.